## Fyrsta gullið í 25 ár

Standard Liege kundi í gjár fegnast um, at felagið fyri fyrstu ferð í 25 ár er besta fótbóltsfelagið í Belgia. Í oddauppgerðini móti Anderlecht um vikuskiftið vann Standard 2-0. Tann sigurin økti munin niður til Anderlecht upp í 10 stig, og við bert trimum umførum eftir at spæla er meistaraheitið tí ein matematisk vissa. Og tað er eisini fult uppibarið. Enn hevur Standard ikki tapt í 31 dystum, og málmunurin á 55-17 ber eisini boð um styrki.

## Rapid økti um metið

Í Eysturríki er Rapid Wien stórfelagið yvir øllum. Og um vikuskiftið løgdu teir enn meira afturat imponerandi steypaskápinum. Við at vinna 3-0 á Altach er Rapid nevnliga fýra stig á odda undan seinasta leikumfarinum, og so er fyrsta gullið síðani 2005 veruleiki. Samanlagt er talan um 32. gullmerki hjá Rapid Wien, og teimum hagtølunum er einki annað felag í nær námind at røkka.

B68-NSÍ 0-2 (0-2):

# Innanmenn eru framvegis omaná

*B68*

*NSÍ*

**Eftir tap fyri grannunum er B68 framvegis stigaleyst, meðan meistararnir teljast millum tey fremstu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Styrkislistin kring Skálafjørðin sær framvegis út, sum hann hevur gjørt tað seinastu árini. NSÍ er omaná, og B68 er undir.

Hetta varð enn eina ferð staðfest leygardagin, tá ið grannarnir hittust á Svangaskarði. NSÍ vann 2-0, og úrslitið var undirstriking av, at meðan Bill Jacobsen og toftamenn stríðast við at samanspæla nýtt lið, so hava teir í NSÍ støði í tí, sum í fjør bar fram til fyrsta FM heitið.

Heilt tað sama er tað tó ikki hjá NSÍ. Tórður Thomsen vísti seg aftur hesa ferð at vera dugnaligur nýggjur maður millum málstólparnar, og nýggi verjuspælarin og miðvallarin kunnu ivaleyst fara at vera við til at mynda gott lið. Hvussu tað er við broddinum hjá nýggja manninum í fremstu ódnini er framvegis meiri ivasamt. Dejan hevði fínan møguleika í 8. minutti, men skotið var blokerað

Ikki minst orsaka av hesum veruleikanum kemur tað væl við, at Jónhard Frederiksberg nú hevur funnið máltevið aftur, sum hann hevði á Skála, men sum hann ongantíð rættuliga fann í fjør.

Jónhard Frederiksberg setti hol á, tá ið 1. hálvleikur var knappliga hálvrunnin. Hjalgrím Elttør sendi horna innfyri, og mitt fyri málinum var Jónhard leysur og hevði tískil ongar trupulleikar við at fáa mál.

-Vlada Filipovic var heilt týðuliga hildin av Jónhardi, og tí átti dómarin at havt bríkslað fyri frísparki, men tað gjørdi hann ikki, iðra teir seg um í toftaleguni.

B68 hevði ikki marginalirnar við sær fyrstu løtuna. Teir høvdu fríska lotið undan, og fleiri ferðir vóru teir framvið. Næst við at fáa mál var Jacob Bymar, tá ið hann av brotsteigarmarkinum smekkaði til, men bólturin brast í stólpan, og so var leikluturin hjá danska álopsspælaranum lítil, tí miðskeiðis í 1. hálvleiki noyddist hann at fara skaddur av vøllinum. Unglingaspælarin André Olsen loysti hann av.

Spælið var ikki altíð so væl skipað, og í 2. hálvleiki var NSÍ leingi omaná. Málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, men talan var um stóran intensitet, og so leingi, sum munurin bara var eitt mál, var spenningurin stórur.

B68 vildi fegið hava stig, og tí sleptu toftamenn alt meiri í verjuni. Tað lá í luftini, at eitt mál fór at koma afturat, og tað fekk NSÍ, tá ið tað restaðu fýra minuttir. Aftur hesa ferð var talan um deyðbóltsstøðu.

Einar Hansen legði fríspark innfyri úr høgru, Vlada Filipovic royndi at boksa bóltin burtur, men bólturin fór ikki longri burtur, enn at Hjalgrím Elttør fekk tamarhald á, og eftir at hava sneitt eitt sindur smekkaði hann til av brotsteigarmarkinum. Bólturin sang í netmeskunum, og harvið var tað greitt, at øll stigini skuldu vera við í viðførinum inn um Rókina. Innanmenn høvdu fingið fult og eru við í toppstríðnum, og uttanmenn bíða framvegis eftir fyrsta stignum.



*Jónhard Fredriksberg taldist aftur millum málskjúttarnar hjá NSÍ. Enn hava meistaranir ikki tapt í ár, og sigurin á grannunum var heilt víst av tí søtara slagnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Kann gerast betur

Hjalgrím Elttør staðfesti stutt undan leikloki 2-0 NSÍ sigurin. Hann var væl nøgdur við úrslitið, men Hjalgrím sigur seg rokna við, at spælið kann gerast betri, enn tað var hesa ferð:

- Eg haldi, at dysturin var eitt sindur rótutur. Vit eiga at megna betri samanspæl, enn vit vístu hesa ferð, og eg rokni við, at tað fer at verða betri. Sammett við í fjør skulu vit spæla fleiri nýggjar menn inn á liðið, og tað tekur sína tíð. Vit hava spælt tríggjar ferðir, og eg haldi, at vit kunnu vera nøgdir, eftir at vit hava vunnið á B71 á heimavølli og B68 á útivølli og spælt javnt í Gundadali ímóti B36.

**-mørk**

## Lítil munur á

B68 miðvallarin Jann Ingi Petersen var sjálvandi vónbrotin yvir, at tað heldur ikki hesa ferð eydnaðist at fáa stig burturúr:

-Vit hava góðar málmøguleikar, sum vit ikki duga at umseta til mál. Tá ið teir so fáa mál, kennist tað eyka tungt. Eg haldi ikki, at tað var serligur munur á spælinum úti á vøllinum.

*Tit eru framvegis stigaleysir?*

-Vit hava spælt tríggjar sera torførar dystir – á útivølli ímóti Víkingi og EB/Streymi og á heimavølli ímóti NSÍ. Næstu ferð verður avbjóðingin eisini stór, tí tá fáa vit vitjan av HB. Sjálvandi kenna vit trýst á okkum, men vit arbeiða við at samanspæla nýtt lið. Leikliga gongur tað støðugt framá, og vit trúgva uppá, at stigini eisini fara at koma, sigur Jann Ingi Petersen.

**-mørk**